

# Kommunubygnaður skal umskipast

Í hesi vikuni mannar Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, nevnd, sum á ólavsøku næsta ár skal vera liðug at gera uppskot til nýskipan í kommunubygnaðinum, ið hevur til endamáls at geva øllum økjum í landinum møguleika fyri at mennast í javnvág. Ætlanin við umskipanini er at flyta tey økir, sum kunnu flytast til kommunurnar, og soleiðis fáa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum. Uppgávurnar verða loystar, so tær eru fullgóðar samfelagsbúskaparliga, men so nær borgarunum, sum til ber. Uppgávur, ið verða lagdar út, skulu kommunurnar vera førar fyri at røkja sjálvstøðugt. Kommunala umskipanin skal vera ein samlaður pakki, hvørs endamál er at skipa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, har kommunurnar skulu umsita tað, sum kommunalu eindirnar sjálvstøðugt eru førar fyri at umsita. Nevndin, sum verður sett at gera uppskot, verður mannað við fólkum úr viðkomandi stjórnarráðum, umboðum fyri kommunurnar og serfrøðingum. Hon skal skjótast til ber og í seinasta lagi á ólavsøku 2009 gera uppskot um kommunueindir, millumkommunala javningarskipan, raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, blokkstuðul og eftirmeting.

# Betri um Norrøna fór

**Formaðurin í Føroya Fiskimannafelagi, Jan Højgaard, hevði ikki verið keddur um Smyril Line fór av knóranum. – Skipið er als ikki hóskandi at sigla um okkara leiðir. Tað hevði verið betri fyri limirnar hjá okkum, um skipið fór av knóranum, og fólkini fóru við øðrum reiðaríið, sigur Jan Højgaard**

NORRØNA-BJARGINGIN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, hevði ikki sæð tað sum nakran miss, um hansara 100 limir umborð á Norrønu mistu starvið. Hann metir, at annað starv hevði verið klárt til teirra*



*Jan Højgaard hldur tað vera skeivt at bjarga Norrønu við almennum pengum*

Áðrenn løgtingið samtykti at seta partapening í Smyril Line, kom eitt mótmælisskriv frá ymiskum fakfeløgum. Eitt av hesum var Føroya Fiskimannafelag, sum hevur umleið 100 limir tengdar at Smyril Line.

- Eg meti ikki, at skipið er egna at sigla um okkara leiðir, tað hevði rigga best í Miðalhavinum. Við hasum skipinum er Smyril Line eitt falittfyritakandi. Tað hevur eisini verið ein trupulleiki, at fólkið ikki følir seg virt umborð. Tí valdu vit at skriva undir skrivið, sigur Jan Højgaard. Hann leggur afturat, at fólk verða á onkran hátt trýst í land, tí Smyril Line uppfinnur nýggj heiti og størv, har fólk ikki longur trívast í starvinum hjá sær.

- Tað virkar sum, at mann roynir at trýsta føroyingarnar í land, og vit kunnu ikki tulka tað øðrvísi enn, at har hevur verið ein duld dagsskrá, sum gongur út uppá at geva fólkinum minni løn og harðari arbeiði. Tí hevði tað helst verið betri um Norrøna fór, so kundi eitt annað reiðarí, við einum betri skipið kunna givið manningini betri kor, greiðir hann frá, og leggur afturat, at fólkini umborð, helst ikki høvdu mist nakað av inntøkum, um skipið fór á heysin, tí tey høvdu fingið løn í nakrar mánaðir og síðani komið í eitt betri starv aðrastaðni.

## Annað skip hevði komið

Jan Højgaard er ein av teimum, ið metir, at nýtt reiðarí hevði komið at røkja ferðafólkasigling, um Smyril Line fór av knóranum.

- Eg hevði onki samvitskubit fingið, um fólkini vóru koyrd í land, tí eg eri fullvísur í, at annað reiðarí hevði komi, har somu fólkini kundu fingið starv. So eg meti ikki, at limirnir hjá okkum høvdu mist nakað sum helst og høvdu eisini fingið tað betri í longdini, fortelur formaðurin í fiskimannafelagnum.

Hinvegin dugir hann eisini at síggja nakrar fyrimunir við, at tað almenna er meira við í Smyril Line.

- Eg rokni ikki við, at tað almenna fer at ganga við til summi ting umborð, og eg rokni eisini við, at umboð fyrimanningarfeløgini verður við, tá teir fara at umskipa felagið. So tað kann vera, at fólkini fáa tað betri, sigur Jan Højgaard.

## Leiðslan hevur roynt

- Stóri trupulleikin hjá okkum hava verið millumleiðararnir, og vit hava tosað við leiðsluna í Smyril Line um støðuna. Áðrenn Andras Róin fór, royndu vit eisini at finna útav nøkrum tingum, og tað hjálpti. Men tað eru nógvir av limum okkara, ið detta niðurímillum, so tað er ikki gott fyri okkum at hava fólk í eini fyritøku, har etikkurin ikki er í ordan, greiðir formaðurin frá.

## Vísa strategi

Jan Højgaard metir seg ikki hava forbrotið seg móti limum sínum, við at skriva undir mótmælisskrivið saman við øðrum fakfeløgum.

- Onkuntið má mann vera eitt sindur diplomatiskur og vísa strategi. Okkara fremsta uppgáva er sjálvandi at tryggja limir okkara sum best, men mann skal vísa eitt sindur av strategi, og eg meti ikki, at fólkini høvdu mist nakað, um tey vóru koyrd í land, sigur formaðurin í Føroyar Fiskimannafelag.

Fiskimannafelagslimirnir umborð á Norrønu eru í høvuðsheitum polakkar, danir, sviar og føroyingar.

# Vit virða okkara arbeiðsfólk

NORRØNA-BJARGINGIN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Peter Holm, stjóri í Smyril Line, sigur seg ikki kenna nakað til, at fólk verða trýst í land av Norrønu og avnoktar blankt, at nøkur duld dagsskrá er við arbeiðsfólkunum har.

- Eg kann illa fyrihalda meg til tað, sum hevur verið, men eg vil sjálvandi hava eitt so gott arbeiðspláss sum gjørligt fyri okkara arbeiðsfólk. Tað hevði jú gjørt tað trupult at hava virksemi, um vit ikki fingu arbeiðsfólk til skipið, greiðir Peter Holm frá. Hann leggur afturat, at tað er satt, at loypandi broytingar alla tíðina verða gjørdar umborð, fyri at effektivisera virksemi, men tað er ikki nakað, ið fer at steðga nú.

- Mann má eisini minnast til, at talan er bæði um eitt farmaskip og eitt hotel, ið skulu rekast, og tað má mann fyrihalda seg til, tá mann leggur arbeiðsuppgávur, men eg meti, at vit veruliga royna at hava góðar arbeiðsumstøður hjá fólkunum umborð. Vit hava til dømis kunnað arbeiðsfólk okkara fyrst í allari tilgongdini, sum nú hevur verið, sigur stjórin.

Stjórin í Smyril Line greiðir eisini frá, at tað ofta hevur verið ein trupulleiki at fáa føroyingar umborð, men tað ber eisini til at fáa dugnaligar útlendingar. Í tí sambandi leggur hann afturat, at tað á ongan hátt er nøkur duld dagsskrá at fáa føroyingarnar í land, og leggur afturat, at hann ikki kann úttala seg um ting, sum eru hend fyrr, men hann bara kann gera tað so gott sum gjørligt í framtíðini.

Um skipið sjálvt metir Peter Holm seg ikki kunna siga so nógv.

- Eg eri ikki førur fyri at úttala meg skipstekniskt, og tað er Jan Højgaard helst heldur ikki, men tað hevur víst seg, at skip okkara veruliga klárar seg sum farmaskip í løtuni. Vit hava eisini tikið havnirnar har baldrut er burturúr, við til dømis at taka Ísland burtur úr um veturin og heldur sigla oftari til Esbjerg. So til frakt er skipið væl egna í løtuni, greiðir Peter Holm frá.